# Senda onga rokning afturat til Føroya fólk

**Fólkaflokkurin hevur nú boðað samgonguni frá, at í 2015 skal hallið á fíggjarlógini verða burtur, men tað skal gerast við sparingum og natúrligum inntøkuhækkingum, tí avgjøld og skattir skulu ikki hækkast**

FÍGGJARLÓGIN 2011

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er kjarnin í fíggjarpolitikkinum hjá Fólkaflokkinum, at skattir og avgjøld skulu ikki hækka so tað er ein fortreyt fyri, at kunna halda fram við tí góða arbeiðnum, sum Jákup Mikkelsen, formaður Fólkafloksins á tingi, málber seg*

- Føroyingar skulu ikki hava rokningar.

Tað er er niðurstøðan, sum Fólkaflokkurin er komin til, nú hann hevur viðgjørt fíggjarpolitikkin hjá samgonguni tey næstu árini.

Fólkaflokkurin hevur nú handað samgonguni sítt uppskot til fíggjarligu karmarnar á fíggjarlógini fyri næsta ár.

Áður hevur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, lagt sítt uppskot fram.

Og tað er greitt, at tað er himmalvíður munur á uppskotunum hjá teimum báðum flokkunum.

Javnaðarflokkurin hevur staðfest, at tað ber ikki til bara at spara seg burtur úr kreppuni, tí tað fer at raka vælferðartænastur ov hart.

Tí verður neyðugt at eisini at hækka inntøkurnar á fíggjarlógini við at hækka skattir og avgjøld.

Hinvegin staðfestir Fólkaflokkurin í sínum uppleggi, at tað eru ikki inntøkurnar, sum eru trupulleikin, men útreiðslurnar.

- Tí staðfestir flokkurin, at skattir og avgjøld skulu ikki hækkast tey næstu árini.

- Vit senda ikki Føroya Fólki og vinnulívinum fleiri rokningar, staðfesta bæði Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins og Jákup Mikkelsen, formaður Fólkafloksins á tingi.

## Hallið vekk í 2015

Eftir uppleggingum hjá Fólkaflokkinum skal hallið á fíggjarlógini verða burtur í 2015.

Tað merkir, at einar 880 milliónir skulu burtur tey næstu fýra árini, tá ið renturnar av lánum at fíggja hallið, eru taldar við.

Men tá ið tað ikki skal gerast við at hækka skattir og avgjøld, eru bara tveir møguleikar eftir og tað er at dúva upp á nattúrligan vøkstur í samfelagnum og sparingar.

Fólkaflokkurin skjýtur upp, at almennu útreiðslurnar skulu lækka útvið 2% um árið í miðal og saman við vanligum inntøkuhækkingum, førir tað við sær, at hallið á fíggjarlógini er burtur í 2015.

Floksleiðslan sigur, at hetta at kalla í samsvari við tilmælini hjá Búskaparráðnum.

## Avgerðandi fyri arbeiðnum

Flokkurin vil ikki útgreina, hvaðani hesar sparingar skulu finnast, men Jákup Mikkelsen leggur dent á, at talan verður ikki um sparingar hjá teimum eldru og teimum veikastu bólkunum annars.

Tilsamans skulu sparingar finnast fyri slakar 400 milliónir, tí mett verður, at inntøkurnar veksa upp á næstan 500 milliónir tilsamans hesi næstu fimm árini.

- Vit hava vøkstur í samfelagnum og um trý ár, er vøksturin komin upp á 3%.

Fólkaflokkurin hevur skrúvað trý alternativ saman, sum alt samalt gevur sama úrslit í eini roynd at fáa undirtøku.

- Men høvuðsendamálið er at minka almennu útreiðslurnar, tí tað er høvuðstrupulleikin, staðfestir fólkafloksleiðslan.

Hvussu fast standa tit við kravið um, at avgjøld og skattir skulu ikki hækkast?

- At leggja fleiri byrðar á vinnulívið er ímóti tilráðingunum allastaðni, tí tað er vinnulívið, sum skal útvega samfelagnum inntøkur og tí mugu vit geva tí góðar karmar at virka undir, sigur Jákup Mikkelsen

- Vit halda eisini, at skattatrýstið á vanliga fólkið er ivaleysa høgt frammanundan.

Hann staðfestir, at tí er tað kjarnin í uppskotinum hjá Fólkaflokkinum, at skattir og avgjøld skulu ikki hækkast.

- Tað er avgerðandi fyri, at vit kunnu halda fram við tí góða arbeiðnum, sum hann málber seg.

# Kirkjugarðurin á tremur

**Skopunar kommuna er farin undir at gera nýggjan kirkjugarð, oman úr elsta kirkjugarðinum**

KIRKJA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í Skopun halda tey nú ondini og vóna, at ikki fleiri fólk doyggja í næstum.

Verandi kirkjugarður er so at siga fullur, bara hendiga leiði er eftir.

Tann garðurin hevur verið víðkaður i smáum, men nú ber ikki til at víðka hann meira, tí tað er hella allastaðni, sigur Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun.

Kommunan er í so sein við at finna eina loysn, men arbeiðið er farið í gongd. Í staðin fyri at víðka verandi kirkjugarð, skal nýggjur garður gerast oman úr tí elsta kirkjugarðinum.

Kommunan hevur gjørt kloakkina, og samráðingarnar við tey, sum eiga teigarnar, eru við at koma undir land, sigur Gerhard Lognberg.

Lendið har er gott, og tí skuldi verið skjótt at grivið stykkið upp.

Av tí at tað hevur skund at fáa nýggjan kirkjugarð, verður helst bara ett petti gjørt liðugt beinanvegin.



*Gamli kirkjugarðurin sæst fremst á myndini. Nú er kommunan farin at fyrireika nýggjan kirkjugarð oman úr hesum garðinum. Hin kirkjugarðurin longur úti er fullur*
*Mynd: Sandportal*

# Brúkt stolin visakort

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað hendir meira enn so, at fólk missa gjaldskort burtur, og í summum førum er onkur farin við teimum.

Hetta vikuskiftið fekk politiið tvær fráboðanir um, at visakort vóru horvin, og í báðum førum ert kortini komin á aðrar hendur, sum hava brúkt av kortunum.

Nakrar túsund krónur eru brúktar